*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

TIPS

# Hvat nýtt tey finna uppá ...



## Seattle ljósakrúna frá Halo-Tech Design

Ljósakrúnan nýtist ikki altíð at vera ein ommusligur krystall-eiturkoppur. Hesin hóskar væl til minimalistiska stílin, sum nógv velja at innrætta húsini við í dag.



## Havi ikki sæð so smart...

Bibabath er baðikar til barnafamiljuna, sum hevur brúsukabinu, men kortini vil lata børnini skvatla viðhvørt. Tá tú ikki brúkar baðikarið, kanst tú leggja tað saman og krógva tað burtur.

## Glaðar klemmur

Smart snið og glaðir litir. So verður tað ikki stuttligari at heingja klæðir út á snór. BB 10 klemmurnar halda væl, rukka ikki klæðini, detta ikki sundur og rusta ikki.



## Klikkaðir retrokopper fra Stuff



Crazy Mugs er hóskandi navn til hesir spildurnýggju retrokopparnir frá Stuff Design of Scandinavia. Í røðini eru trý ymisk mynstur, í tveimum litsamansetingum. Fáast við og uttan honk, í gávueskjum við fýra í hvørjum.

# Soleiðis selir tú húsini skjótari...

**Húsameklarar eru samdir um, at tað er nógv lættari og skjótari at selja eini hús, sum taka seg væl út á myndum og tá fólk koma til framsýning.**

### 1. Lufta út

Heimið skal vera ljóst og lætt. Lufta væl út, pussa vindeygu, vaska gólv og støva av.

### 2. Hugna um

Hugna um við frískum blómum, tendraðum stearinljósum, góðum anga og kanska enntá eldi í grúgvuni.

### 3. Lat innbúgvið standa

Ikki tøma húsið heilt, tí so kennist tað deytt. Lat nakrar møblar standa eftir. Tó ikki so nógvar, at tað sær yvirfylt út.

### 4. Ger neyðugar ábøtur

Um eitt vindeyga er uppetið av roti, fokuserar keyp-arin bara uppá tað. Brúka nakað av peningi til at umvæla ógvusligar skaðar og lýti.

### 5. Slepp ljósinum inn

Ljós skapar lív og gleði. Lova dagsljósinum inn og tendra ljósið í myrkum krókum. Fríska húsini upp við ljósari máling, bæði innan og uttan.

### 6. Pent uttanum

Nýsligið græs og ruddiligt uttanum hevur góða ávirkan.

### 7. Krógva djórini

Øll eru ikki so glað fyri húsdjór. Fá onkran at ansa hundinum og goym onnur djór av vegnum.

### 8. Set ein skilagóðan prís

Set heldur prísin í lægra lagi, tí so koma fleiri at hyggja hjá tær fyrst

### 9. Brúka netverkið

Hóast tú kanska hevur ein húsameklara, kanst tú skunda undir søluna við at lata onnur vita, at tú selir. Bið grannarnar reklamera eitt sindur og sig eisini frá millum vinir og á Facebook.

### 10. Far út

Ikki vera til staðar, tá møguligir keyparar hyggja at húsinum. Tey tora ikki at spyrja um alt, tá eigarin er til staðar.